


# BESTI NÝGGI BÓLKUR ELLA EINSTAKLINGUR

## Analog Norð

**Ein nýggjur elektro/rokk bólkur kom undan kavi í vetur. Analog Norð hevur verið nógv frammi í november/desember fyri at marknaðarføra nýggju útgávuna "Friendly Fire".**

Høvuðsmaðurin, Jan Rasmussen er mestsum eitt óskrivað blað í føroyskum tónleikahøpi, og tað er eisini hann, ið hevur skrivað og framleitt tónleikin á útgávuni. Men nú kom hann brakandi inn á tónleikapallin við einari imponerandi debutútgávu. Kristoffer Mørkøre hevur samframleitt og miksað allan tónleikin. Fløgan "Friendly Fire" er á tremur við fangandi og spennandi løgum, og í skrivandi løtu er lagið "China Girl" sett í umfar í Kringvarp Føroya. Bólkurin hevur verið á konsertferð kring landið, og hevur fingið jalig orð við á vegnum frá hesari konsertferð. Eisini hevur bólkurin framført live í Kringvarp Føroya, og tann framførslan riggaði stak væl.

## Bendar Spónir

**Bendar Spónir er bólkur mannaður við ungum, evnaríkum tónleikarum. Bólkurin hevur eina óimponeraða tilgongd til tónleikin. Teir spæla instrumentalan, droymandi tónleik, sum tíðum kennist sýrutur.**

Tað krevur nógv av einum bólki at framføra instrumentalan tónleik. Tað krevur sera gott tamarhald á ljóðførunum, tað krevur sterkar kompositiónir og ikki minst krevur tað, at tú kemur útum pallkantin tá tú framførir. Alt hetta meistrar Bendar Spónir. Í eina tíð hava teir framført á ymsu pallunum í Føroyum, og ummælini hava verið sera góð. Onkur ummælari hevur enntá kosið teir at vera besta bólkin í føroyska tónleika umhvørvinum í løtuni. Bendar Spónir hava áður framført saman við Petur Pólson.

## Fróði Hansen

**Eitt spennandi navn í tónleikalandslagnum í Føroyum. Hann setti eitt lag í umfar í Kringvarpi Føroya, og gekk lagið "Nobody Goes To Hell For Having Loved" eina sanna sigursgongd í Kringvarpinum.**

Við fløguni "Creeping Storm" hevur Fróði Hansen bjóða føroyingum eina lovandi debut útgávu. Talan er um eitt slag av Fólka/Rokk tónleiki, har tekstur og tulking er í hásæti. Eitt sindur av blues hómar tú eisini í tónleikinum. Fróði hevur eina lekkra rødd, sum ljóðar troytt uppá tann góða mátan. Hann hevur eina fantastiska nærveru í tónleikinum, og hevur eina sera sterka innliving í sangirnar.

Hann er ein góður lagsmiðjur, sum lagið "Nobody Goes To Hell For Having Loved" er eitt livandi dømi um.

## Anna Katrina Petersen

**Tann púra ókenda Anna Katrina Petersen trein á føroyska tónleikapallin í 2009. Hon staðfesti seg beinanvegin sum ein fantastiska dugnalig songkvinna, og hevur nú við fløguni "Colourless Day" dokumentera síni frálíku songkynstur.**



Hon er konservatorie útbúgvin sangari. Hon hevur búð í Danmark í nógv ár, og hevur tí ikki verið so kend her heima á klettunum. Men nú hevur hon verið sera virkin í tónleikalívinum í Havn, Hon hevur songkynstur sum fáur. Hennara stílur er eitt sindur popp/jassuttur.

Í loftmiðlunum hevur serliga lagið "Go Go" verið nógv at hoyrt. Eitt sera vakurt lag, sum lýsir hennara tónlistarligu dygdir. Hon spælir klaver og syngur á fløguni, og verður óivað nógv at hoyra í 2010.

## Oniontree

**Oniontree er ein sera lovandi bólkur. Teir hava fyri kortum útgivið sína fyrstu EP, og hava sett sær høg mál. Hóast teir eru eitt nýtt navn, so eru meldingar um, at teir eru vælumtóktir av ongum minnið enn Chief1 (maðurin aftanfyri The Dreams).**

Oniontree spæla sama punk/rokk tónleik sum The Dreams, bara eitt sindur harðari. Teir eru sera væl samanspældir, og tykjast taka tónleikin í sera stóran álvara. Løgini "Machine" og "Solitude" vitna um, at bólkurin er sera væl fyri, tá tað ræður um at skriva og tilrættisleggja løg. EP´in hjá bólkinum er væl framleidd, og ungdómar í Føroyum og í Danmark eru longu farin at flokkast um hendan spennandi bólk.

# BESTA LAGIÐ

## Kelling - Valravn



Eitt sera væl úr hondum greitt lag, har Anna Katrin Egilstrøð er í serflokki. Lagið er ein meldur av rútmum og tónum, sum skapa ein fatastiskan spenning.

## Sometimes Truth Needs A Lie – Brandur Enni



Vakurt popplag í heimsflokki. Lagið stendur onki aftanfyri poppløg, sum vit dagliga hoyra á altjóða tónleikarásum.

## Soul Company – Høgni Lisberg

Eitt pumpandi, brakandi lag sum tvingar føturnar at sveiggja við rútmunum. Høgni Lisberg hevur veruliga rakt seymin á høvdi við hesari framførsluni.

## Nú Brennur Tú Í Mær (live) – Eivør



Live-framførslan av lagnum er serstakliga sterk. Framførslan er enn meira dramatisk og ógvuslig enn vit kenna hana frá studioútgávuni av sama lagið. Eivør skarar enn einaferð framúr.

## Under The Sun – The Dreams



Lagið hevur gingið sína sigursgongd í Danmark. Hevur ligið á ovastu rók á Boogie-listanum, og er fyrsta stigið hjá The Dreams út úr ríkisfelagsskapinum. Eitt lag við sera, sera stórum potentiali.